Djúpar foyrur í kirkjuni

Kemur ein í hesum døgum fram við Vágs Kirkju, síggjast djúpar foyrur í múrinum, sum menn eru í fer við at umvæla

UMVÆLING
Dagfinn Olsen

Vágs Kirkja telist millum teir serstøku kirkjubygningarnar í Føroyum. Og mong meta óivað eisini, at kirkjan er millum tær vakrastu.

Men í hesum døgum er hon ikki so vøkur. Í kirkjumúrinum síggjast ógvusligar foyrur.

Umvæling

Orsøkin til heldur ógvusligu sjónina er, at ein tiltrongd umvæling er í gongd. Vágbingar hava í longri tíð stríðst við lekar í kirkjuni. Roynt hevur verið at bøta um, men greitt er, at talan er um stórarbeiði, skal ein koma trupulleikanum til lívs.

Kirkjan er bygd í tríatiárunum og er ikki longur nakar nýggjur bygningur. Tá í tíðini varð stoypt við hond og arbeiðið at byggja kirkjuna vardi eini 10 ár.

Sermerkt er, at takrennan er stoypt í múrin. Veðurlagið og annað hevur tó, sum árini eru gingin, havt frostspreingingar við sær. Hetta hevur havt lekar við sær og nú er so illa statt, at størri umvæling má til.

Tað er hetta, sum menn nú eru í fer við. Borað hevur verið í múrin og nýtt koyrt í. Hetta er orsøkin til djúpu foyrurnar í múrinum.

Jóhannis Østerø, limur í kirkjuráðnum sigur, at tað er sera haldgott evni við límí í, sum koyrt verður í aftur múrin og hetta sigst halda væl.

Ymsar ætlanir eru um annað umvælingararbeiði í Vágs Kirkju í næstu framtíð, men fyrst er tað múrurin og takrennurnar, sum skulu setast í stand, fyri at koma lekunum til lívs.



Vágs Kirkja verður í hesum døgum umvæld, eftir frostspreingingar, ið hava havt lekar við sær. Ógvusligt sær tað út, tá djúpar foyrur verða boraðar í múrin, men sera haldgott evni verður koyrt í aftur

(Mynd: D.Olsen)

NØVN Í VIKUNI

Landssjúkrahúsið tveir sálarfrøðingar

Tríggir sálarfrøðingar starvast nú á Landssjúkrahúsinum

STARVSSETAN
Turið Kjølbro

Heri Kragesteen og Kári Petersen eru frá 1. august farnir í starv sum sálarfrøðingar á Landssjúkrahúsinum. Heri Kragesteen, sum hevur starvast sum lærari á Føroya Læraraskúla í nógv, er settur í fast starv, og Kári Petersen, sum í nøkur ár hevur arbeitt á Sernámsdeplinum, røkir farloyvisstarv fyri Ásvør Skaalum. Frammanundan starvast Eyðun Joensen sum sálarfrøðingur á Landssjúkrahúsinum.

Heri Kragesteen arbeiðir nú sum sálarfrøðingur á Landssjúkrahúsinum

Rás 2 sendi úr Vági

Tað er ikki so langt síðani, at tað gjørdist møguligt hjá suðuroyingum í sunnaru helvt av Suðuroynni at hoyra Rás 2. Um vikuskiftið sendi rásin so beinleiðis úr Suðuroynni, úr Vági, og eydnaðist tiltakið væl

ÚTVARPSTILTAK
Dagfinn Olsen

Um vikuskiftið vitjaði Rás 2 í Vági. Sent var fríggjadagin og leygarkvøldið var beinleiðis sending frá klokkan 17 til 21:30.

Rás 2 vitjaði Suðuroynna við studioútgerð og riggaði til í Verkstaðnum inni á Bakka, ið er vardur verkstaður, við góðum og hugnaligum hølisumstøðum.

Tað er ikki so langt síðani, at Rás 2 fekk ein sendara settan upp í Suðuroynni, so suðuroyingar í sunnara parti av oynni eisini sleppa at hoyra rásina. Suðuroyar Sparikassi stulaði, so hetta gjørdist møguligt.

Viðkomandi

Manningin í Rás 2 hevur leingi havt ætlanir um at vitja Suðuroynna og um vikuskiftið var so væl eydnaða royndin gjørd.

Í venjingarrúminum inni á Bakka riggaðu Petur Jacobsen, Óla Jákup Rólantson, Sonne Smith, Laila Jacobsen og Georg eystan Á útgerðina til, so ein hugnalig útvarpsstova kom burtur úr, við allari neyðugari sendiútgerð.

Samrøður og vitjanir í økinum vóru á skránni. Gestir komu inn á gólvið í útvarpsstovuni og eisini vitjaðu tónleikarar og settu dám á við beinleiðis tónleiki og sangi. Eisini varð ringt runt til allar bygdirnar at heilsa uppá og kanska fræetta okkurt áhugavert. Har kom fram, at ikki allir suðuroyingar hava enn funnið útav at stilla lurtitólið á FM 102,6 — tað er Rás 2 -, tí teir halda seg ikki hava møguleika at hoyra, men við senditiltakinum úr Vági gjørdi rásin greitt, at hon nú hoyrist í hvønn krók í økinum og at hon eisini er viðkomandi har.

Eingin trupulleiki var at fylla senditíðina í sendingini úr Vági, har framburður er at hóma í vinnuliga virkseminum, eins og á frítíðar- og mentanarøkinum, so nóg mikið var at tríva í og gera burtur úr.

Og sum programmleiðarin Óla Jákup Rólantson segði, tá hann endaði sendingina klokkan 21:30 leygarkvøldið, so høvdu onkur avboð verið, men høvdu øll tey komið inn á gólvið, ið ætlaðu sær, so hevði útvarpsmanningin sitið til á midnátt.

Eitt væl eydnað útvarpstiltak úr Vági leygarkvøldið. Manningin á Rás 2 var eisini nøgd og tað tóktist ikki óhugsandi, at hetta kann gerast uppaftur.

Um vikuskiftið hevði Rás 2 væleyndað senditiltak úr Vági. Tað er ikki langt síðani, at fólk í sunnaru helvt av Suðuroynni fingu møguleika at hoyra Rás 2 og vitjaði rásin nú í økinum hjá nýggju lurtarafjøldini

(Mynd: D. Olsen)

Góð TILBOÐ í Miklagarði...

TILBOÐ
Angus
Búffur av tjúksteik
1/2 kg.
49.95
Kiloprísur: 99,90

2X
TILBOÐ
Piparfruktir
2 fyri
9.95

Jensen
Sósir
Frítt val
15.00

First Class
Eplabátar ella chips
750 gr.
10.00

10X
TILBOÐ
Tomatir
10 fyri
14.95

Becel
Flótandi margarin
500 ml.
8.95

Beauvais
Barnagreytur
1 pakki
17.00

5X
TILBOÐ
Miko
Flustar ella malnar tomatir
5 dósir
10.00

Bamboline
Blæur
1 pakki
39.95

TILBOÐ
Orginal
Juice
2 ltr.
14.95

Tilboðini eru galdandi frá tysdegnum 28. august til og við leygardagin 1. september 2001

MIKLAGARÐUR
SMS • Saltangará

petur & petur • 320870